## … um ítrótt

Eg íðki ikki annan ítrótt, enn at eg venji eitt sindur í Yndi. Eg róði kapp í 1999 og 2000, og eg fylgi framvegis við Ørnini. Annars havi eg ikki so stóran áhuga fyri ítrótt, men eg kann gott fara til ein fótbóltsdyst hjá FS Vágum ella landsliðnum.



## … um fartelefonir

Eg havi fartelefonina við mær allastaðni, har eg fari. Hon stendur ofta á ljóðleys. Kanska er tað tí, at havi hana ljóðleysa, tá ið eg eri til arbeiðis, og so gloymi eg at koyra ljóðið frá aftur, tá ið eg komi heim. Fartelefonin skal bara altíð verið í nærheitini.



*- Eg stúrdi nógv fyri at gera sendingina í fyrstuni, men nú er tað blivið meira stuttligt at gera hesa. Og tað er eisini gott, at tað er ein kvinna, sum er vertur í sendingini, sigur Hjørdis Gudmundsen, vertur í 15 teimum bestu hjá Útvarpinum. Mynd: Jens Kr. Vang*

sendingina. Og tað er eisini gott, at tað er ein kvinna, sum er vertur í sendingini, sigur Hjørdis.

### Nógvar reaktiónir

Hjørdis hevur í øllum førum fingið nógvar positivar reaktiónir frá fólki.

– Tað er altíð onkur, sum hevur onkra negativa viðmerking, men eg havi næstan bara fingið positivar reaktiónir, síðani eg byrjaði at gera sendingina. Tað er stuttligt at hoyra frá fólki og merkja, at tey hava áhuga fyri sendingini, sigur hon.

– Tað er eisini stórur áhugi fyri at atkvøða fyri sangunum á listanum, og áhugin hevur verið vaksandi, síðani eg byrjaði.

Aðrir vertir í 15 teimum bestu hava eisini roynt seg sum plátuvendarar – DJ – á dansistøðum, men tað hevur Hjørdis ikki.

- Eg havi als ikki hugsað um at blíva DJ, og eg rokni í øllum førum við, at tað hevði eg ikki torað.

## Fakta

**Navn:** Hjørdis Gudmundsen
**Aldur:** 24 ár
**Heimstaður:** Sandavágur
**Bústaður:** Havn
**Starv:** Í skrivstovulæru á Fútaskrivstovuni